



Ein av áarbátunum siglir framvið grøvini hjá Baltzarvon Platen nærhendis Motala



gera nágreiniligar ætlanir um, hvussu veitin skuldi gerast eystureftir, og tað gjørdu teir.

Gustav Adolf IV, kongur, livdi frá 1778 til 1837, hann var kongur frá 1792 til 1809. 1809 varð hann avsettur sum kongur, sagt varð, at hann var sinnissjúkur. Ein orsøk til, at hann varð avsettur, mundi helst vera tað vanlukku kriggið við Rusland, 1808-1809, tá ið Svøriki misti Finland, sum tað hevði havt í umleið hálvtsættahundrað ár. Gustav Adolf IV doyði í útlegd í Schweiz 1837, fátækur. 1884 varð kista hansara flutt til Riddarholmskirkjuna í Stockholm. Gustav Adolf IV var sonur Gustav III, ið varð myrdur á einari gríluveitslu í Stockholm 16. mars 1792. Hann liggur eisini í Riddarholmskirkjuni.

1810 varð partafelagið »Gøta Kanalbolag« stovnað, og nú kundi arbeiðið byrja. Millum teir mongu menn, sum hjálptu Baltzar von Platen at byggja Gøtaveitina, vóru tveir brøður úr Värmlandi, teir vóru Niels og John Ericsson. Niels varð kendur sum jarnbreytabyggjari í SVøriki, John fór fyrst til Onglands, síðani til Norðuramerika. Tað var hann, sum fann upp skipsskrúvuna, av hesum gjørdist hann heimskendur.

Vit kunnu lítið ætla, hvussu ómetaliga stórt arbeiði at grava Gøtaveitina hevur verið við teimum amboðum, menn høvdu tá á døgum. Í 22 ár arbeiddu 60.000 soldátar saman við russiskum krigsfangum frá vanlukku finska krignum við at gera vietina. Atta miljónir m^3 av mold og leiri vórðu grivnar upp og fluttar burtur við trillubørum, 200.000 m^3 av bergi vórðu sprongdar burtur, slúsur og brýr vórðu bygdar.

1822 var veitin í Vesturgotlandi liðug, og 22 ár seinni var komið igjøgnum Eysturgotland, men Baltzar von Platen fekk ikki at siggja endan av verki sínum, hann doyði 1829 og varð lagdur til hvílar undir einum stásiligum mausoleum við Gøtaveitina nær við býin Motala.


Tá ið Gøtaveitin var gjørd, var vatnleiðin millum Eystrasalt og havið vestanfyri liðug, og dreymurin um hesa vatnleið, sum hevði vart í triggjar øldir, var vorðin verulieki. Men henda flutningsleið fekk brátt harða kapping frá øðrum flutningsmøguleikum, serstakliga frá jarnbreytunum.

Til at byrja við vóur tað bara seglskip, sum fóru gjøgnum veitina, men tey máttu av og á verða drigin av rossum ella oksum, sum gingu á gøtum, ið vóru gjørdar á bakkanum við veitina. Hetta helt uppat so hvørt, sum maskinur vórðu settar í skipini, men væl inn í okkara øld hjálptu ross og oksar skipum gjøgnum Gøtaveitina.

Í kappingini millum Gøtaveitina og jarnbreytina um vøruflutning, mátti veitin lúta, men framvegis hevur hon stóran týdning, tí stór skip kunnu koma bæði eystanifrá og vestanifrá og føra vørur til býirnar við Vättern og Vänern.

Vøruflutningurin eftir Gøtaánni og Gøtaveitini er, sum nevnt, nógv minni nú, enn hann var, men samstundis, sum hesin flutningur minkaði, vaks ferðamannaferðslan og smábátaferðslan.

Fyri tann, sum er overvaður av hvønndagsins stríði og strevi, er tað góð hvíld at fara eina ferð eftir Gøtaánni og Gøtaveitini, eg vil ikki tala um, er tað onkur, sum eigur bát sjálvur ella kann leiga sær bát, sum tað ber til at gera hjá ókunnugfólki, ið ferðast á enskum áum og veitum, tí tá ræður hann sær sjálvum og hevur betri stundir at siggja tey mongu forvitnisligu støðini, ið eru at siggja á leiðini eftir Gøtaánni og Gøtaveitini.



Juno, sum vit sigldu við á Gøtaánni

Framhald